## So snórabeint

**Vit komu so snórabeint saman, sigur Dávid Reinert Hansen, stjóri í partafelagnum Vágatunnilin**

UNDIRSJÓVARTUNNILIN
*Edvard Joensen*

– Vit raktu so snórabeint. Øðrumegin vóru vit fimm millimetrar við síðuna av hvørjum øðrum og á hinari síðuni vóru 25 millimetrar. Soleiðis tók ein fegin Dávid Reinert Hansen, stjóri í partafelagnum til.

Hann vildi tó einki siga um, hvussu nú verður við víðari arbeiði hjá Vágatunnlinum.

Tað hevur verið frammi, at partafelagið skal standa fyri arbeiðinum við undirsjóvartunnlinum undir Leirvíksfirði.

Men tað vildi hann als onga viðmerking gera til.



*Vit raktu so snórabeint, sigur Dávid Reinert Hansen, stjóri í Vágatunlinum*

## Met í tunnilsboring

Ein av arbeiðsmonnunum í Vágatunnlinum er Olaf Ellingsgaard av Eiði. Hann hevur verið við til at bora 30 kilometrar av tunnli í Føroyum

UNDIRSJÓVARTUNNILIN
*Edvard Joensen*

Millum arbeiðsmenninar, sum fegnaðust um tað stórarbeiðið, sum nú er komið ígjøgnum, var Olaf Ellingsgaard av Eiði.

Hann hevur verið við til at bora umleið 30 kilometrar av tunnli í Føroyum, og tað meta menn vera met hjá okkum.

Hann var við til at bora allar SEV tunnlarnar norðuri á Eiði, og nú hevur hann verið við at bora Vágatunnilin frá fyrsta degi.

–Tað næsta verður vónandi at fara undir Leirvíksfjørð, sigur hann.



*Olaf Ellingsgaard av Eiði hevur verið við til at bora 30 km av tunlum í Føroyum*

## Vænti tilflyting til Vágar

**Jógvan Sjúrður Hansen, bygdarráðslimur í Sandavági, kendi tað sum eina av teimum stóru løtunum í lívinum, tá fast samband var millum Vágar og Streymoy. Hann væntar framburð í Vágum, nú fast samband er**

UNDIRSJÓVARTUNNILIN
*Edvard Joensen*

– Hetta er heilt fantastiskt, segði ein sera fegin bygdarráðslimur í Sandavági, tá skotið var ígjøgnum hóskvøldið.

Hann greiddi frá, at hann hevur verið við í fyrireikingum til hesa løtuna líka síðan miðskeiðis í áttatiárunum, tá byrjað varð fystu ferð at tosa um undirsjóvartunnil.

Tað, sum er sera symbolskt og positivt í hesum, segði hann, er tað, at løgmaður kom av Streymoynni til Vágar.

–Soleiðis meti eg eisini, at gongdin fer at verða í framtíðini. Fólk fer at flyta til oynna, og soleiðis fer hetta at hava framburð við sær í Vágum.

Eins og øll onnur væntar hann, at undirsjóvartunnilin fer at hava stórar batar fyri vinnulívið í Vágum við sær.



*Jógvan Sjúrður Hansen, bygdarráðslimur í Sandavági, fegnast um fasta sambandið*



*Vágafólk vóru í stórum tali komin norður á Reynsbakka at vera hjástødd hesa løtuna, sum tey øll fara at minnast og tosa um*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Tann stóra løtan

**Løtan var søgulig og stór. Ja allur dagurin var stórur, ivaðist eingin í, sum komin var suður á Reynsbakka, tá hátíðarhaldið í samband við seinasta skotið í undirsjóvartunlinum undir Vestmannsundi, skuldi skjótast**

UNDIRSJÓVARTUNNILIN



*Sosialurin*

**Vágar:** Bilrøðin var longu hampiliga fitt, tá vit eini trý korter áðrenn fráferð, møttu á ferjuleguni í Vestmanna. Væl mannað lið av Sosialinum á ferð vestur í Vágar til at vera hjástaddir, tá hendan stórhendingin í føroyskari samferðslusøgu skuldi fara fram.

Allastaðni komu tey frá. Úr Havn og Eysturoynni, Av Sandoynni var onkur, og úr Klaksvík vóru fleiri. Jú eingin ivi um, at her var spenningur, sum kundi merkjast.

Vit bíða í kaffistovuni, meðan Ternan er ein túr á Oyrargjógv. Her er væl av fólki inni, og nógv gongur eisini uttanfyri.

Ein teirra, sum kemur framvið, er borgarstjórin í Kvívík, Heini Holm. Hann skal sum ver aman eisini vera við, tí hann er í grundini vertur fyri tunlinum. Hann kemur upp í Kvívíks Kommunu.

Onkur løgtingsmaður úr Norðoyggjum er ovurfegin um hetta tiltakið, tí nú verða maskinurnar helst leysar nakað skjótt, og so kann tað hedna, at tær far aundir Leirvíksfjørð. Hvør veit? Løgtingið hevur samtykt, at tað skal gerast.

Ternan leggur at, og fólk skunda sær umborð. Her fyllist skjót, og fólk eru allastaðni. Í salongum og á dekkinum. Tey, sum hava bil, eru seinast upp í salongini, og har er ikki hugsandi um at fáa sitipláss. Men túrurin er stuttur, so tað man ikki fara at gera nakað.

Vit hava prátað við borgarstjóran í Kvívík, og vilja leggja úrslitið útá Internetið. Tað sleppa vit inn í messuna hjá manningini at gera, og tað ber eisini til her á Vestmannasundi við eini fartelefon.

Av Oyrargjógv veðrur farið við skundi suður móti tunnilsmunnanum, har væl av bilum og heilt nógv fólk longu er.

Vit fáa parkeringspláss og fara inn í smipjuna, har skipað er soleiðis fyri, at fólk, sum komin eru at forvitnast, men iki sleppa inn í tunnilin, kunnu síggja, tað, fyriferst har inni, á stórskýggja. Og okkurt til matna og drakk er eisini sett á borðið, so her verður eisini ball, eins og tað veðrur i tunlinum.

Vit fara inn í tunnilin við bussi. Væl veðrur ansað eftir, at trygdin er i lagi, og listi við nøvnunum á feðrafólkunum veðrur gjølla gjøgnumgingin, áðrenn koyrt veðrur.

Einar 800 metrar inni í tunlinum verður steðgað á, meðan nevndarfomaðurin í partafelagnum Vágatunlinum fer longri inn at festa í fjúsið til seinasta skotið.

Og tað brestir. So øll, ið ini eru, vita av. Trýstið er nógv, og tað ristir í. Men loft og veggir halda. Sterkt sum bergið.

Og so er tann stóra løtan komin, at opið er undir einum føroyskum sundi og fast sambnand millum oyggjar við tunli. Tað ahva vit ikki roynt fyrr her hjá okkum, hóast tað er væl kent aðrastðani.

Fram við vegginum við síðuna av grótrúgvuni koma nøkur fólk. Løgmaður og landsstýrismaðurin við vinnumálum eru framstir. Kanska í øvugta raðfylgju.

Teir heilsa upp á móttøkunevndina vágamegin, sum eru landstýrismaður og løgtingsmenn umboðandi Vágar. Jú, hetta er hátíðarligt, og fólk síggja nakað stórt í hesum. Síggja øgiligar fyrimunir við at búgva og arbeiða í Vágum, emn eru samstundis samd um, at hetta er landsogn, vit hava fingið.

Sosialmanningin er heppin at hava møguleikar at sleppa til útgerð í Vágum, sum ger, at vit kunnu leggja frásagnir frá allari hendingini á Internetið beinanveg. So tað verður gjørt, áðrenn farið veðrur til Miðvágs, har vit eru bodnir við til borðhald, sum hildið veðrur fyri arbeiðsfólki, gestum og øðrum, í á einhvønn hátt vaðra av tunlinum.

Nógvar vóru røðurnar, og politikararnir, sum við vóru, hildu seg ikki aftur. Skilligt var, at valár er.

Eftir eitt borðhald, ið vardi einar fýra tímar, varð farið við bussi undir Sundinum aftir til Leynar, haðani fólk spjaddist alt eftir, hvar tey búðu, ella hvar tey høvdu flutningsfar standandi.

Men Vágfólk í busisnum hjá Finni fóru nogv aftur til Sandavágs, har tey eru so fegin um tunnilin, at Sandavágs Kommuna skipaði fyri ókeypis, almennum tunnilsdansi í SÍF húsinum.



*Seinasta skotið er latð av, og mannamúgvan savnast um Jørgen Niclasen, landsstýrismann, sum stendur í einum lastbili og heldur røðu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



# Soleiðis gekk tað

## Myndir, sum sýna arbeiðsgongdina við undirsjóvartunlinum undir Vestmannasundi



**Gravimaskinan kemur í land í Vágum 28. august 2000**



**Fyrsta skotið í Leynum 28. september 2000**



**Maskinurnar síggja hvørja aðra undir vegagerð á Fútakletti 24. oktober 2000**



**Borurin settur í í Vágum 26. februar 2001**



**Fyrsta skotið í Vágum 27. februar 2001**



**Seinasta skotið er farið. Hol er á, og løgmaður hevur spákað ígjøgnum tunnilin 10. januar 2002**